# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 26.09.2016*

**Bygdaráðsfundur: 26.09.2016 kl. 17.00 til kl. 18.30**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Jákup Olsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Marjun Gaardbo skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 94/2016 Veitingarvirksemið el, vatn o.a.**

J.nr. 13.01.00-P20-1-16

**Málslýsing**

Uppá fyrispurning hevur kommunan fingið tilboð frá Sp/f Rók-el uppá gøtuljós við gøtuna Lýðarsvegur- Regnavegur.

Tilboðið er áljóðandi kr. 35.500 v/mvg, og tá setur kommuna mastrarnar upp, so klárt er at binda í.

**Tilmælir**

Á fundi 13.09.2016 mælir Tekniska nevnd til at taka av tilboðnum frá Sp/f Rók-el, áljóðndi kr. 35.500 v/ mvg, og at kommunan setur mastrarnar upp, so klárt er at binda í.

Á fundi 20.09.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og at peningurin verður tikin av stovninum gøtuljós.

**Avgerð**

Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 95/2016 Bygningsreglulering, grundstykkir og reglugerðir**

J.nr. 02.34.02-P20-30-16

**Málslýsing**

Í skrivi 20.08.2016 søkja Poula og Hanus Olsen um loyvi til at gera garð fram við vegnum á matr. nr. 699ae.

**Tilmæli**
Á fundi 13.09.2016 mælir Tekniska nevnd til at geva Poulu og Hanus Olsen loyvi til at gera garð fram við vegnum, samb. galdandi byggireglugerð.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 96/2016 Bygningsreglulering, grundstykkir og reglugerðir**
J.nr. 02.034.02-P20-35-16
**Málslýsing**
Í skrivi 22.08.2016 søkir Bogi Olsen um byggiloyvi til eitt høsnarhús á matr. nr. 406, niðan fyri vegin vestureftir.

**Tilmæli**
Á fundi 13.09.2016 mælir Tekniska nevnd til at senda umsóknina til ummælis hjá Landsverk.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 97/2016 Bygningsreglulering, grundstykkir og reglugerðir**
J.nr. 02.34.02-P20-34-16
**Málsýsing**
Í skrivi 01.09.2016 søkir Bárður Kjeld um byggiloyvi til bilhús og garðar á matr. nr. 125.

**Tilmæli**
Á fundi 13.09.2016 mælir Tekniska nevnd til at játta byggiloyvi til bilhús og garðar á matr. nr. 125, eftir ávísum treytum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 98/2016 Bygningsreglulering, grundstykkir og reglugerðir**
J.nr. 02.34.02-P20-38-16
**Málslýsing**
Í skrivi 12.09.2016 søkir Kjartan Højgaard um loyvi at byggja ein hjall uppí neystið.

**Tilmæli**
Á fundi 13.09.2016 mælir Tekniska nevnd til at játta Kjartani Højgaard byggiloyvi til hjall uppí neystið, samb. galdandi byggireglugerð.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 26.09.2016*

**Mál nr. 99/2016 Bygningsreglulering, grundstykkir og reglugerðir**

J.nr. 0234.02-P20-37-16

**Málslýsing**

Í skrivi 22.08.2016 søkir Rúni Samuelsen um byggiloyvi til úthús, sum skal brúkast til oljufýr og ketil.

**Tilmæli**

Á fundi 13.09.2016 mælir Tekniska nevnd til at játta Rúna Samuelsen byggiloyvi til úthús, eftir ávísum treytum.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 100/2016 Vegir og ferðsla**

J.nr. 05.13.01-P20-2-15

**Málslýsing**

Tekniska nevnd hevur eftirmett ferðsluforðingarnar í kommununi og mett verður, at ein ferðsluforðing eigur at verða gjørd afturat á Regnavegnum, í svinginum uppi á Regni.

**Tilmælir**

Á fundi 13.09.2016 mælir Tekniska nevnd til, at ein ferðsluforðing verður gjørd afturat í svinginum uppi á Regni, og at ferðsluforðingin verður, sum tær ið eru gjørdar á Gaddavegnum, mettur kostnaður kr. 15.000.

Á fundi 20.09.2016 staðfestir Fíggjarnevndin, at peningur er tøkur undir stovninum Vegir – ferðsluforðingar.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 101/2016 Alment virksemið yvirhøvur**

J.nr. 00.05.03-G01-2-16

**Málslýsing**

Jólatrøini 2016 skulu tendrast. 1. sunnudagur í atvent er 27.11.2016.

**Tilmæli**

Á fundi 14.09.2016 mælir Mentanarnevndin til, at jólatrøini tendra 26.11.2016 kl. 16.00.

Aftaná verða kakao og bollar at fáa í kirkjukjallarinum. Síðani verður konsert, í Fríðrikskirkjuni, við luttøku av lokalum sangkreftum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 102/2014 Alment virksemið yvirhøvur**
J. nr. 00.05.03-G01-2-16
**Málslýsing**
Minningarhald teirra sjólátnu 1. novembur, sum er ein  týsdag, stundar til, og tí er neyðugt at biðja prest ella annan halda røðuna við minnisvarðan.

**Tilmæli**
Á fundi 14.09.2016  mælir Mentanarnevndin til at hava minningarhaldið í Fríðrikskirkjuni kl. 15.00, síðan verða kransar lagdir við minnisvarðan. Kommunan bjóðar kaffi o.a. í kirkjukjallaranum eftir minningarhaldið.

Tosað er við Ova Brim, prest, sum hevur játtað at hava minningarhaldið 1. novembur 2016.

**Avgerð**
Tilmælið frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 103/2016 Parkir, frítíðar/ítróttarannlegg og lendisrøkt v.m.**
J.nr.04.03.00-P20-2-16
**Málslýsing**
Á bygdarásfundi 29.08.2016 var samtykt, at kommunan skuldi kanna kostnaðin av at gera spælipláss og útifittness á Svangaskarði. Kommunan hevur fingið tilboð frá Blika, Innspark og Vind.

**Tilmælir**
Á fundi 14.09.2016 mælir Mentanarnevndin til taka av tí lægsta tilboðnum  uppá spæliplass og útifittness á Svangaskarði. Lægsta tilboðið eigur Innspark, sum er uppá kr. 360.251, uttan trampolinir. Við trampolinum er kostnaðurin kr. 412.028, íroknað 6,25 % í MVG.

Á fundi 20.09.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 104/2015  Alment virksemið yvirhøvur**
J.nr. 00.32.10-S08-2-16
**Málslýsing**
Ásetan av fíggjarkarmi 2017 fyri Nes kommunu – 1. viðgerð

Á fundi 20.09.2016 hevur Fíggjarnevndin viðgjørt fíggjarkarmin fyri 2017.

**Tilmæli**
Fíggjarnevndin mælir til at áseta fíggjarkarmin fyri 2017 soleiðis:

| | |
|---|---|
| Skattainntøkur | kr. 46.904.000 |
| Rakstrarútreiðslur | kr. 43.548.000 |
| Úrslit áðrenn avdrøg/íløgur | kr. 3.356.000 |

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.